# Fullveldis tilgongdin kann seinka Norðoya tunnlinum !

**Absalon Matras**
*valevni Sambands-floksins í Norðoyggjum*



Undirritaði hevur altíð verið av teirri áskoðan, at tey rættindi vit eiga í ríkisfelagsskapinum eru so virðismikil fyri okkum føroyingar, at tey eiga vit at halda fast um, so leingi vit hava tey fyri neyðini. Men sjálvsagt eiga vit at geva vinnilívinum so góðar umstøður sum gjørligt, soleiðis at vit við tíðini fáa ein sjálvberandi búskap.

**Eitt sera álvarsamt val**
Eitt val er altíð álvarsamt, men tað er nakað heilt serligt við hesum valinum. Henda samgongan hevur fingið so nógvan pening úr Danmark, sum eingin onnur samgonga áður hevur fingið. Men nú - beint áðrenn hon fer frá - sker hon blokkin við 366 milliónum (umleið tað sum Norðoya tunnilin kostar). Afturat hesum hevur hon samtykt risa íløgur, sum skulu gjaldast í komandi árum.

Eg havi einki ímóti íløgunum, men tá ið samgongan metir tað verða rætt at frásiga sær inntøkur uppá 366 milliónir, so má ein eisini taka avleiðingarnar av hesum og siga við seg sjálvan: Hvar kunnu vit spara pening, ella hvar kunnu vit finna aðrar inntøkur, fyri at demma upp fyri teimum negativu avleiðingum eitt slíkt stig førir við sær.

Eg veit væl, at landskassin hevur havt stórt avlop seinastu árini, men vit eiga ikki at gloyma, at um stuðulin úr Danmark ikki var við, hevði landskassin havt hundratals milliónir í halli á hvørjum ári, hesi seinastu árini, hóast byrðurin hevur verið so góður, sum ongantíð áður. Hetta sigur ikki so lítið um, hvussu stóran týdning blokkurin hevur fyri tað føroyska samfelagið.

Av hesum síggja vit, at stórar íløgur, so sum Suðuroyarskip við havnaløgum og Norðoya tunnilin, bert høvdu verið ynskidreymar, um eingin peningaveiting kom úr Danmark.

Prísurin fyri fullveldispolitikkin er longu høgur, og loysingarflokkarnir boða frá, at kósin, sum stungin er út, skal haldast.

**Norðoya tunnilin**
Mikið rumbul hevur verið í samgonguni seinastu tíðina, ikki minst av málinum um Norðoya tunnilin. Nógvir fullveldismenn siga, at um einki hendir nú, kann arbeiðið uppá undirsjóvartunnilin verða skotið langt út í framtíðina.

Hetta eri eg ikki bangin fyri, tí so vítt eg veit, eru allir flokkar á tingi fyri, at tunnilin verður gjørdur, ongantíð ov skjótt.

Men eitt er, sum ger fólk ivasom: Verður peningur tøkur til allar hesar stóru íløgurnar sum samtyktar eru, samstundis sum inntøkurnar til landskassan lækka munandi?

Mín áskoðan er, at heldur førdi politikkurin fram, og blokkurin verður minkaður burtur í onki, kunnu vit vænta, at stórmál, so sum Norðoya tunnilin, mugu skjótast langt út í framtíðina, um vit ikki aftur skulu uppliva áttatiárini, tá ið samfelagið fór á húsagang.

Hetta eigur veljarin hava í huga, nú valið stundar til.

Neyðugt er tí at fara burtur frá fullveldispolitikkinum og føra ein politikk, sum tryggjar framburð og menning her á landi. Ein slíkan politikk hevur Sambandsflokkurin.

**Fast samband?**
X við Sambandsflokkin

# Framtíðar samstarv tvørtur um bygdamørk

**– Avgerandi fyri framtíð og framburði í Suoyroynni**

**Johan Dahl**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Tosað verður nógv um globalisering og samstarv tvørturum landamørk, sum sjálvandi er alneyðugt í einum heimið, har alt verður tættari at hvørjum ørðum orsakað av góðum samskiftis - og flutningsmøguleikum .

Ídag er samstarv og altjóða samhandil ein sjálvfylgja fyri vinnulívið, eins og tað er fyri fyri flytan av vitan inn t.d. Kunningartøkni og Granskning av ymsum slag,fyri Telemedesin og mangt , mangt annað.

Allir teir hentleikar, sum lættað okkum um samstarvið við útheimin hava gagnað okkara samfelag og vinnulívið og gjørt lívið lættari, eins og tað at samskifta um allan knøttin við internetinum er fyri einhvønn ein hentleiki, sum vit fyri fáum árum síðani bert kundu droymað um.

Hóast hendan stóra broyting er hend á altjóða pallinum, so hevur ta víst seg at verða sera trupult hjá okkum at dragað eina línu bygdanna millum tá íð neyðugt hevur verið at standa saman, um mál sum gagna økinum.

Tað hevur víst seg, at tað gamla mynstrið har kappingin millum økini var hørð fyri at upprætthaldað virksemið á staðnum framvegis er stór, hetta hóast væl skuldi borið til, at gjørt eina raðfesting av hvat vit vilja skal verða í Suðuroynni av vegakervi/tunnlum,almenn um stovnum, skúlum, socialum aktivitetum, vinnuvirksemið, nýggjum vinnum, mentunarligum møguleikum, ja - rætt og slætt hvussu skal Suðuroyggin síggja út um t.d. 4 ár, 8ár, 12 ár ella um 20ár???

Tað er umráðandi, at vit leggja okkum eina ætlan fyri oynnað og síðan málrættað arbeiða framm ímóti at fáa hesa ætlan førda út í lívið.

Hetta kann einans verða gjørt um allir partar takað saman hendur og lyfta í felag – óansæð hvønn politiskan lit vit annars hava.

Mín vón er, at vit eru so mikið at okkum komnir, at vit við opnum sinnið seta okkum niður saman og gera eina slika framtíðarætlan fyri alla suðuroynna , - fólkinum sum her býr og komandi ættarliðum at gagnið.

# Troytt av sjálvstýristosinum

**– Kann vera, men tú kanst velja at fáa doyvara settan á, meðan vit bíða**

**Leila Hjørleivsdóttir á Lofti**
*Valevni Fólkafloksins*



Løgtingssamtyktin um sjálvstýri fyri Føroya fólk gongur út 30 apríl.

Velja tit núverandi samgonguflokkar aftur við meiriluta á tingi, so hava tit samstundis tryggjað tykkum, at tit um eini 11 ár við eini fólkaatkvøðu kunnu gera av, um tit hava broytt støðu ella framhaldandi ynskja suverenar Føroyar.

Her er onki at vera bangin fyri, fólkið eigur síðsta orðið.

Fólkaflokkurin vil í bíðitíðini framhaldandi arbeiða, sum hann hevur gjørt hesi seinastu fýra árini.

Yvirtaka eitt mál fyri og annað eftir, tá tey eru búgvin til tess, og vit hava pening.

Tit hava kanska latið tykkum ávirkað av fjølmiðlunum, ið væl hava dugað at hildið lív í tí avlýstu fólkaatkvøðuni – við tí endamáli at lýsa Fólkaflokkin sum tann, ið leypir frá.

Tíanverri er tað álvarsligari enn so, tí fólkaatkvøðan stóð í veljarakanningin í februar 2001 til at falla.

Meirlutin (58 %) hevði sagt nei til tann sjálvstýrisleistin, ivaleyst grundað á Nyrupsa 4 ára skiftistíð. Danska stjórnin átti so næsta leik, sum hevði verið at boða ST frá, at vit høvdu sagt Ja til at vera í ríkisfelagsskapinum. Eitt Nei frá okkum er eitt Ja til hinar.

At vit síðan hava hoyrt um allar møguligar aðrar variantar, har eitt Nei er eitt Nei eina tíð, og síðani kann blíva til eitt Ja og so aftur til eitt Nei osv, osv,........,tað broytir ikki ta støðu, ið løgmaður bygdi sína avgerð á.

Noreg segði Nei til innliman í ES. Hví er eitt Nei hjá teimum so ikki eitt Ja onkra aðra staðni?

Tí teir hava onga aðra staðni at fara við einum Ja. Tað er brúkt, teirra evsta vald er ikki longur í fremmandum hondum.

Enn eru vit hvørki fuglur ella fiskur í fólkarættarligum høpi. Men vit mugu ikki billa okkum inn, at tað ber til at mingulera við fólkaatkvøðum um so álvarslig mál í tíð og úrtíð.

Vit hava ein langan leysan enda. Ja'ið til okkum sjálvi.

Í meðan hesin leysi endin gerst styttri og styttri, er so nógv annað at fáa av skafti.

Hoyrdi eg nakran teska viðgerðartørvin hjá teimum rørslutarnaðu? So skuldu tit kaga í valskránna hjá Fólkaflokkinum.

Gott val.

# Svf og Fleirmentan

**Í Føroyum ella uttanlands?**

**Jákup Fróði Djurhuus**



Ein av høvuðsorøkunum til, at livistøðið í Føroyum ongantíð má vera lægri enn livistøðið í okkara grannalondum, er altjóðagerðin, sum fer fram við fúkandi ferð. Tað er lættari enn nakrantíð at ferðast.Uttan mun til hvar tú ert staddur, so ber væl til at lurta eftir útvarpi, síggja sjónvarp, og lesa bløð, beinleiðis á alnótini, samstundis sum føringar heima lurta og síggja.

Hetta merkir, at ein føringur uttanlanda, eins væl kann dyrka sín samleika, sum ein føringur sum er heima á klettunum.

Hetta setur stór og øðrvísi krøv - ikki minst peningalig - til politisku skipanina, eins væl og til okkara mentanarberar.

**80% av Sjónvarpssendingunum eru ókeypis:**
Umstøðurnar at gera føroyskt sjónvarp, hava ongantíð verið betri enn nú. Svf verður rikið fyri 24 mió kr ídag. 80% av tilfarinum er ókeypis. Tvs, at tað kostar bara 240.000 kr at útvega 80% av sjónvarpstilfarinum ið sent verður. Skuldi hesar sendingar verið keyptar, hevði fíggjarætlanin hjá Svf skjótt bólgna uttan at vit fingu nakað føroyskt fyri pengarnar.

Sjónvarpið metir, at tað kostar einar 70 mió kr um árið at framleiða 3 tímar av føroyskum sjónvarpi um dagin. Og hetta verður sagt at vera ein bílig framleiðsla. Tað merkir, at skulu vit síggja gott føroyskt sjónvarp, so er tað ikki bíligt.

**Endamál og úrslit:**
Føringar eru førir fyri at lívbjarga sær allastaðni úti í heimi. Tí er tað sera umráðandi, at landið verður stjórnað soleiðis, at føringar ikki velja at vera verandi uttanlands, heldur enn at virka heima í Føroyum. Uttanlands kunnu føringar hittast í føringafeløgum, og uttanlands kunnu føringar dyrka sín samleika eins væl og í Føroyum, samstundis sum teir kunnu njóta tað ískoyti, sum tann fremmanda mentanin hevur at bjóða.





# 16 ár eftir einum degi?

**Olga Biskopstø**
*valevni Tjóðveldisflokksins í Norðoyggjum*
*www.biskopsto.com*



Tað er manna lyndi, at gloyma tað ringa og heldur minnast tað góða, sum er hent. Hetta er ein góður eginleiki at hava, um hann ikki førir við sær, at vit gloyma so nógv, at vit endurtaka tey mistøk, vit hava gjørt.

Øll eru vit greið yvir, at sjúkrabilarnir í Føroyum ikki gjørdust 16 ár eftir einum degi, og at sjúkrahússengurnar ikki rustaðu eftir 4 árum. Vit vita eisini øll somul, at tey gomlu í Føroyum ikki gjørdist gomul eftir 4 árum, og heldur ikki at røktarheimspláss og vantandi umsorgan fyri teimum gomlu er nakað nýkomið her á landi.

Tað er so lætt at gloyma, og so lætt at trúgva teimum ljósareyðu søgunum um framtíðina. Tær bestu søgurnar tykjast vera tær, ið lova heilar 16.000 kr. um mánaðan frá tí almenna, til hjún ið eru vorin pensjónistar.

Men framtíðin skal vera ljós, og vit skulu hava dirvi til at trúgva uppá eina trygga framtíð her á landi, har øll fáa ágóðan og hava tað gott. Men tað gera vit ikki við at lova teir flestu pengarnar, men við at skapa tær bestu loysnirnar.

**Pengar er ikki trygd**
Hyggja vit bert fá ár aftur í tíðina – ein tíð vit øll minnast – so vóru m.a. tey gomlu sera illa fyri. Pensjónirnar vóru lágar og lítið, og onki kundi forvinnast uttan so at pensjónin minkaði tilsvarandi. Pensjónirnar vóru eisini skattaðar munandi harðari enn í dag. Tá vóru heldur ikki bygd røktarheim, ellisheim, barnagarðar, alternativar íbúðir, o.sfr., hóast vit brúktu allan blokkstuðulin frá Danmark og tóku eina milliard í láni afturat.

Tá hevði ongin tíð at hugsa um tey gomlu, børnini, tey sjúku, tey brekaðu og sosialt veiku. Vælferðin var góð, og øll arbeiddu fyri at gjalda alt tað, ið skuldi til fyri at hava eitt gott lív, ein vælferð ið bygdi á falskar vónir. Og Føroyar endaðu eisini í djúpari kreppu.

**Tað er so avgerandi neyðugt at vera umhugsin og skynsamur**
Tað er bert ein flokkur, ið hevur verunliga orsøk til at reka ein skynsaman og langtíðarrættaðan búskaparpolitik, og tað er Tjóðveldisflokkurin.

Han er noyddur til tað, tí hann hevur sum mál at gera Føroyar sjálvstøðugar – og at loysa frá Danmark.

Hetta er samstundis tín trygd fyri at Tjóðveldisflokkurin fer at vera skynsamur, hóvligur og ansin á øllum økjum, soleiðis at tú fært eitt gott og frítt lív, við nógvum avbjóðingum undir tryggum viðurskiftum.

Tjóðveldisflokkurin vil tryggja, at lógarverkið á trivnaðarøkinum verður endurskoðað, so samsvar fæst ímillum lóggávu og umsiting. Og at skipaninar verða greiðar, gjøgnumskygdar og lagaðar til føroysk viðurskifti.

Soleiðis kann Tjóðveldisflokkurin veita vissu fyri at tit sum eru og gerast gomul ella óhjálpin koma at hava góðar umstøður at liva undir og at miðvíst verður arbeitt fram ímóti at børn, ung og barnafamiljur koma at fáa tær bestu umstøðurnar.

**Flokkar ið byggja á sand**
At byggja síni hús á sand, ber ikki boð um trygd og vælferð. Tað boðar heldur ikki frá einum álítandi hugsunarhátti og skynsamun arbeiðshátti, ið kann tryggja vælferð og búskaparligt skil.

Tað sum m.a. Javnaðarflokkurin og Sambandsflokkurin lova teimum gomlu, sjúku, brekaðu, børnum og ungum verur ikki bygt á trygga grund og kjølfest í einum sjálvstøðugum búskapi.

Heldur sýnir hetta ómegd, at vit føroyingar framhaldandi skulu vera klientar, ið mugu móttaka og verða tengdir at donskum pengum.

Frá nú av og til valið 30. apríl fer at hoyrast ein songur, ið fer at lova "fólkið fyrst". Men fólkið kann ikki koma fyrst, so leingi pengarnir úr Danmark eru "fyrst" og fólki "næst". Úrslitið verður, at fólki kemur aftaná og má rudda upp eftir eini kreppu, skapta av politikarum úr Javnaðar- og Sambandsflokkinum.

Framtíðin er trygg – við Tjóðveldisflokkinum.

# Bakkamálið spøkir aftur

**Jógvan Arge**



Tórshavnar Býráð hevur aftur havt spurningin um sethúsabygging á einum kommunalum neystataki úti í Bakka til viðgerðar.

Av tí, at almenna lýsingin av málinum kann skiljast eins og at alt býráðið tekur undir við óregluseminum úti í Bakka, fari eg at skoyta nøkur orð uppí.

Tað var ikki alt Tórshavnar Býráð, sum á fundi týskvøldið mælti til at broyta byggisamtyktina fyri Tinganes soleiðis, at sethús eisini kunna byggjast í Bakka.

Samtyktin varð gjørd við teimum átta atkvøðunum hjá samgonguni fyri og teimum fimm atkvøðunum hjá minnilutanum í móti.

Minnilutin helt fast við ta støðu, sum hann áður hevur havt í hesum kommunala vinarmáli, og tók undir við tí mótmæli, sum er komið frá grannum.

Í byggi- og býarskipanarnevndini hava eg sjálvur og Hildur Eyðunsdóttir heldur ikki tikið undir við, at neystagrundin í Bakka verður frámatrikulerað restini av Tinganesi, so býráðið kann leiga takið á neystunum til sethús.

Av tí, at spurningurin um byggingina úti í Bakka bæði er í rættinum og í landsstýrinum og trætumálið sostatt ikki avgreitt, mæltu vit á fundi í byggi- og býarskipanarnevndini mánadagin frá at fara undir nakra frámatrikulering.

Úrslitið varð kortini, at samgongan samtykti at biðja Matrikulstovuna fara undir frámatrikuleringina.

Støðan í málinum er nú, at tað stendur til landsstýrið og tess bygginevnd at taka endaliga støðu til, um fyritreytirnar fyri at broyta byggisamtyktina úti í Bakka eru loknar. Tað halda vit ikki.

# 30 nýggj búpláss til fólk við serligum tørvi

**Eyðólv Dimon**
*Javnaðarflokkurin í Suðurstreymoy*



Tað almenna hevur, sambært forsorgarlógini, skyldu at hjálpa teimum, sum ikki eru før fyri at klára seg sjálvi. Tíverri sigur lógin ikki nóg greitt, hvat slag av hjálp tann einstaki hevur rætt til, og tí er tað í fleiri førum upp til politiska myndugleikan at gera av, hvør hjálpin skal vera.. At hetta ikki er nóg gott, kemur eina best til sjóndar á bústaðarøkinum, har fylgjan ofta er, at tey brekaðu noyðast at búgva hjá foreldrum ella systkjum,tí hesin bólkur hevur verið raðfestur so aftarliga frá myndugleikanna síðu.

**Tjóðveldis samgongan raðfestir brekað seinast**
Her kundi verði nevnt, at í kreppuárunum í 90´unum vóru bert tvey nýggj sambýlir við 10 búplássum útvegað. Seinastu fýra árini, meðan landskassin hevur flotið yvir av pengum, so eru eingi búpláss útvegað til teirra við serligum tørvi. Peningurin skuldi brúkast til annað endamál, sum Tjóðveldisflokkurin raðfesti frammaligari.

**Borgarligu kenna onga ábyrgd**
Í Havnini er støðan púra burturvið á bústaðarøkinum. Borgarligu flokkarnir kenna als onga ábyrgd og royna at skumpa initiativi út á privata bústaðarmarknaðin við skattalættum til teirra, sum leiga út. Men hetta er als ongin loysn, men heldur ein undanførsla fyri ikki at viðurkenna sína ábyrd. Javnaðarflokkurin hevur nú sett sær fyri at útvega 30 nýggj búpláss komandi fýra árini. Til kunningar fyri sitandi samgongu, skal eg upplýsa, at hetta er mett at kosta uml. 24 mio., og hetta hevur onki við útgjaringarpolitik, sum sitandi samgonga skírir útspæl Javnaðarfloksins.

**81 búpláss komandi 10 árini**
Hetta er ikki eitt stórt tal, men sambært einum yvirliti frá 2000, sum felagskapurin Javni hevur gjørt, so vóru tá 17 fólk, ið høvdu bráðfeingis tørv á einum búplássi, so tey 30 nýggju búplássini eru ein byrjan. Yvirlitið hjá Javna vísir eisini, at samlaði tørvurin á bútilboðum til brekað er mettur at verða 81 búpláss fyri alt landi fram til 2010. Hetta vísir, at forsorgarlógin ikki er nøktandi, og má gerast heilt av nýggjum, so at hon setir tann brekaða og hjálpina til tann brekaða í fokus.

